# Nógv borivirksemi á Atlantsmótinum í ár

*Fleiri av oljufeløgunum, sum ætla sær at vera við, tá leitingin byrjar á føroyska landgrunninum, fara at vera rættiliga virkin á bretskum øki í ár. Nógvir nýggir brunnar verða boraðir skamt frá føroyska markinum , og tað er greitt, at úrslitið av hesum boringum kann eisini hava stóran týdning fyri komandi leiting við Føroyar*




JAN MÜLLER

Høgu oljuprísirnir og tað bjartskygni, sum er komið í kjalarvørrinum á teimum, fer eisini at hava ávirkan á virksemi á Atlantsmótinum í ár. Hetta er økið millum Hetland og Føroyar. Í seinastu útgávuni av Hart Deepwater International verður nógv gjørt burtur úr komandi virksemi á djúpum vatni kring heimin í hesum árinum. Serstakliga lovandi sær tað út fyri Meksikanska Flógvan, men eisini út fyri Brasilia, Vesturafrika, Egyptaland og á Atlantsmótinum verður nógv virksemi í ár.

Ikki færri enn seks operatørar fara at bora nýggjar brunnar á Atlantsmótinum í ár. Hesir eru Agip, BP Amoco, Enterprise, ExxonMobil, Marathon og Texaco. Hetta eru alt feløg, sum eisini eru virkin á føroyaøkinum og sum ætla sær at vera við í 1. útbjóðing her. Talan er um at bora seks brunnar ella møguliga fleiri í teigum vestan fyri Hetland, flestu teirra skamt frá føroyska markinum.

Tað er tí ikki bara sum at siga tað at fáa hendur á boripallum, nú virksemi er stórt alla aðrastaðni eisini. Haraftrat kemur, at tað eru bara heilt fáir boripallar, sum kunnu arbeiða á djúpum vatni millum Hetland og Føroyar.

### Fyrsta boring vestan fyri Suðuroyggjar

Sambart bretska oljublaðnum hevur Enterprise leigað boripallin Jack Bates, sum er rættiliga kendur um okkara leiðir. Tey, sum ferðaðust við Norrønu fyrr í ár, kundu síggja henda risastóra og nútímans boripallin stutt frá føroyska markinum, har hann boraði fyri Mobil.

Nú skal Jack Bates bora ein brunn vestan fyri Isle of Lewis á 980 metra dýpi. Vantandi verður sett á her í apríl. Hetta er fyrstu ferð, at borað verður so tætt upp at Suðuroyggjum (Hebridunum).

Texaco hevur ætlanir um at bora av nýggjum í Torridon økinum vestan fyri Hetland, har felagið fyrr hevur funnið gass. Síðani er tað Marathon, sum í fjør fekk umhvørvisváttan fyri at bora ein brunn vestan fyri Skotland, nærhendis St. Kilda. Dýpið her er nærum 1300 metrar. Rættiligur rumbul hevur annars verið um hesa boringina. Greenpeace hevur mótmælt, at tað verður borað í økjum, sum liggja nær oynni St. Kilda. Tað ber ótta fyri, at møguliga óhapp kunnu fáa álvarsligar fylgjur fyri ríka djóralívið á og við St. Kilda.

Oljufelagið Agip, sum eisini er kent um okkara leiðir, fer undir at bora ein brunn nakað suður úr føroyska markinum á 850 metra dýpi.

BP Amoco hevur ætlanir um at bora nærhendis verandi Foinaven oljukelduni. Í hesum sambandi er ætlanin eisini at binda ein sokallaðan „satelitt" te. ein brunnur, sum liggur nakað burtur frá móðurkelduni, í sjálvt Foinavenfeltið. Hetta verður tann fyrsti av slíkum slag á Atlantsmótinum og er av stórum týdningi fyri Foinaven feltið, sum kann økja um framleiðsluna.

ExxonMobil ætlar at bora tveir brunnar á Atlantsmótinum í ár. Torført er at fáa upplýsingar um, hvar felagið fer at bora, men gitt verður, at felagið helst fer at halda fram við boringini norðan fyri Hetland, miðskeiðis millum Føroyar og Hetland. Mobil hevur borað í hesum økinum (blokkur 213) nú í eina tíð á sera djúpum vatni, men eingir upplýsingar eru komnir út enn. Mett verður tó, at Mobil hevur rakt við nógv gass.

Eisini onnur oljufeløg so sum Conoco og Total, sum somuleiðis eru við á føroyaøkinum, hava ætlanir um at bora nýggjar brunnar í ár á Atlantsmótinum. Í løtuni bíðar Total annars eftir svari frá ES um ætlaðu samanleggingina við oljufelagið ELF.

Hart Deepwater International, sum javnan kemur við tíðindum og analysum um boring á djúpum vatni, sigur í januar útgávuni, at ein av forðingunum fyri leiting á Atlantsmótinum er umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace, sum áður hevur roynt at stegða bæði seismikkskipum og boripallum í at gera kanningar.

### Bera ótta fyri Greenpeace

Ein av orsøkunum til, at fleiri av oljufeløgunum eru varin við ikki at geva so nógvar upplýsingar um, hvar og nær tey fara at bora, kann vera óttin fyri Greenpeace.

Men feløgini hava skund, tí skulu tey fara undir boring longu í apríl, so er neyðugt at gera sáttmálar við feløgini, sum leiga út boripallar. Og tá talan er um Atlantsmótið eru bert eini tríggir pallar, sum kunnu brúkast. Teir eru Transocean Leader, Jack Bates og Sovereign Explorer. Hetta eru alt nøvn, sum føroyingar koma at hoyra meira til í framtíðini. Tá farið verður undir at bora á føroyska landgrunninum, møguliga í august ella september 2001, verða tað hesir tríggir, sum koma uppá tal.

Spurningurin um Greenpeace er eisini nakað, sum føroyskir oljumyndugleikar hava í huganum. Herfyri segði stjórin í Oljumálastýrinum, at arbeitt verður við málinum, hvussu føroyingar skulu fyrihalda seg, um Greenpeace fer at seta forðingar í verk, tá oljuboring byrjar á føroyska landgrunninum.

Oljufeløg, sum Sosialurin hevur tosað við, eru annars sera varin við at úttala seg um Greenpeace.

### Bretska útbjóðing

Enn er óvist, nær bretar fara at seta hol á sína næstu útbjóðing vestan fyri Hetland. Mett varð, at bretar fóru at lata upp fyri eini útbjóðing stutt eftir at markið við Føroyar kom uppá pláss. Men her kom so eitt sakarmál millum Greenpeace og stjórnina heilt óvart á oljufeløgini. Greenpeace vann málið í Hægstarætti í London um, at eitt ES-direktiv um umhvørvisreglur eisini fevnir um økið uttan fyri 12. fjórðingar frá strondini. Eygleiðarar hava mett, at hetta málið fór at útseta komandi bretsku útbjóðingina í óásetta tíð, tí eitt veruligt sakarmál fór at taka drúgva tíð.

Nú hava bretsku oljumyndugleikarnir gjørt av at fylgja krøvunum, sum verða sett í umrødda ES-direktivi og sleppa einum drúgvum sakarmáli móti Greenpeace. Sambart bretska oljublaðnum Uppstream fer DTI, sum er bretska orku- og ídnaðarmálaráðið at almannakunngerða komandi útbjóðing tíðliga í hesum árinum. Tað kann merkja, at komandi leiting á bæði føroyskum og bretskum øki verður nakað um somu tíð.



*Bert heilt fáir boripallar kunnu brúkast um okkara leiðir. Tí fara teir at vera nógv umbidnir í næstum, tá fleiri nýggir brunnar skulu borast fyrst í bretskum øki og seinni í føroyskum*

**FORTHCOMING ATLANTIC MARGIN WELLS AT A GLANCE**

| Operator | rig | Target/ location | water depth | Remarks |
|---|---|---|---|---|
| Agip | Transocean Leader | Tranche 44/block 164/28 | 850m (2,800ft) | |
| BP Amoco | - | 204/28: Vrackie | 269m (887ft) | |
| ExxonMobil | Two wells | Poss. Tranche 61 | 1,615m (5,329ft) | |
| Enterprise | Jack Bates (ss) | Block 154/1a: Benbecula | 980m (3,234ft) | |
| Marathon | considering Sovereign Explorer | 153/5 | 1,280m (4,224ft) | |
| Texaco | TBA | Torridon: 214/27 | 700m (2,200ft) | |
| **Possible well** | | | | |
| Conoco | TBA | 213/25 | 1,000m (3,280ft) | Awaiting approval by partners |









# Kurt aftur í hitanum

*Jan Dam hevur aftur fingið landsliðsboð, og tað kemur illa við, at fýra stuðulsspælarar ikki fara við niður til Spania*



*Kurt Mørkøre er kann sanniliga fegnast í hesum døgum, nú hann aftur er komin inn í landsliðshitan*

Samstundis sum skráin fyri komandi HM undankappingina varð almannakunngjørd, komu nøvnini frá FSF skrivstovuni á teimum átjan spælarunum, sum Allan Simonsen vil hava við niður til Spania seinni í mánaðinum. Týdningurin av venjingarleguni verður ikki tann, sum hann plagar at vera fyri undankappingina, tí eingir undankappingardystir eru á skránni fyrr enn í september.

Men ferðin til Spania hevur í sær sjálvum størri týdning hesa ferð, enn hon nakrantíð áður hevur havt, tí almennir landsdystir skulu spælast bæði ímóti Íslandi og Finnlandi.

### Minni liðiligt

Í fyrstu atløgu høvdu tríggir av føstu monnunum givið avboð. Jákup Mikkelsen er akkurát vorðin pápi fyri aðru ferð, og tað hevði verið ov nógv av fótbólti, um hann nú skuldi farið frá familjuni og so aftur, tá Herfølge fer á venjingarlegu mitt í februar. Tí hevur málverjin givið avboð.

John Petersen ætlar at fáa læraraskúlan lidnan í summar, og tí hevur hann ikki tíð at fara. Og tað hevur mansliðið í honsbólti hjá strandingum neyvan nakað ímóti. Útvísingin í Prag í fjør hevur við sær, at Pól Thorsteinsson fer einki at fáa burturúr hesum landsliðsárinum.

Felags fyri John Petersen og Pól Thorsteinsson er, at teir kunnu brúkast á nógvum plássum. At teir báðir ikki fara við niður til Spania ger, at møguleikarnir hjá venjaranum at seta liðið saman verða nógv færri, enn teir annars høvdu verið.

At Jákup Mikkelsen ikki fer við til Spania fer uttan iva at hava við sær, at Jens Martin Knudsen fer at verja føroyska málið í teimum báðum landsdystunum, og tað merkir aftur, at honum fer bara at resta ein dyst í at røkka hálvt hundrað altjóða skrásettum landsdystum.

### Kurt upp í part

Kurt Mørkøre var á listanum, sum Allan Simonsen sendi út undan venjingunum á Svangaskarði næstsíðsta vikuskifti. Tað varð ikki roknað við, at útisetarnir skuldu møta á Svangaskarði, men teir vóru á listanum, tí teir vórðu roknaðir at hoyra til landsliðshópin.

Í fyrstu atløgu kundu vit fríggjadagin staðfesta, at Kurt Mørkøre ikki taldist millum teirra, sum landsliðsvenjarin hevði aktuellar ætlanir við, men sunnudagin varð Kurt Mørkøre limaður inn í átjan manna hópin, og tað hevur við sær, at møguleikarnir hjá venjaranum at seta liðið verða eitt sindur fleiri, enn teir annars høvdu verið.

Kurt Mørkøre er komin í hópin fyri liðfelagan í Sogndal, Hans Fróða Hansen, og harvið kunnu teir báðir staðfesta orðatakið, at eins deyð er annans breyð.

Meðan leirvíkingurin higartil bara hevur verið eftiransari í miðverjuni á landsliðnum, so hevur Kurt Mørkøre røkt nógvar ódnir á landsliðnum. Hann hevur verið aftasti maður, eftiransari, vongverji í høgru, hann hevur røkt fleiri pláss á miðvøllinum, og hann hevur verið í álopinum.

At Kurt Mørkøre nú er úttikin fyri Hans Fróða Hansen kundi bent á, at ætlanin er at brúka hann í miðverjuni, har Pól Thorsteinsson hevur spælt fleiri ferðir, men tað er sjálvandi ikki óhugsandi, at venjarin fer at nýta høvið at vita, hvussu væl Mørkøre maðurin er trimmaður til pláss í álopinum við síðuna av sjálvskrivaða Toda Jónsson. Hinir, sum fara at kappast um hetta plássið á ferðini, verða Uni Arge, Jákup á Borg, Rógvi Jacobsen og Heðin á Lakjuni.

### Jan aftur í hitanum

Jan Dam spældi ikki á landsliðnum í fjør, og tað varð av fleiri mett, at altjóða tíðarskeiðið hjá veteraninum, sum hevur spælt 36 landsdystir, var liðugt. Men við at geva fyrrverandi liðformanninum landsliðsboð, hevur Allan Simonsen víst, at hann framvegis vil hava Jan Dam í hópinum. Hvat hann skal brúkast til veldst um, hvussu hann fer at standa seg á venjingarleguni, og hvussu hann fer at standa seg á liðnum hjá B68, sum hann fyri fyrstu ferð skal umboða í ár.

Burtursæð frá Sunvardi Joesen, so hava allir hinir seytjan spælararnir, sum eru úttiknir til Spaniaferðina, áður spælt á landsliðnum. Merkisvert er annars, at fleiri spæliloyvi framvegis eru hjá feløgunum, sum spælarar umboðaðu í fjør, men sum teir ikki skulu spæla fyri í ár.

Ferðalagið, sum fer niður til Spania 28. januar, og sum kemur aftur í Vágar 5. februar, sær soleiðis út: Jan Dam, HB, Jóhannes Joensen, HB, Allan Mørkøre, ÍBV, Uni Arge, Akranes, Henning Jarnskor, GÍ, Sunvard Joensen, GÍ, Sámal Joensen, Leiftur, Øssur Hansen, B36, Jákup á Borg, B36, Fróði Benjaminsen, B68, Heðin á Lakjuni, KÍ, Rógvi Jacobsen, KÍ, Jens Martin Knudsen, Ayr United, Jens Kristian Hansen, Air United, Óli Johannesen, AGF, Kurt Mørkøre, Sogndal, Julian Johnsson, Sogndal og Todi Jónsson, FCK.

Umframt spælararnar og teir báðar venjararnar, Allan Simonsen og Jógvan Martin Olsen, verða í ferðalagnum Dánjal Andreasen, ferðaleiðari, Sigurð Hansen, ognarrøkil, Jens Pauli Marstein, lækni, og fysioterapeutarnir John-Reid Skoralíð og Álvur Hansen.

JH

# Hans Fróði hevur brotið óstbeinið

*Óhepni landsliðsmiðverjin í Sogndal skal binda frið í minsta lagið í fýra vikur*

Tað kom so illa við, sum tað kundi. Undir venjing í Sogndal í síðstu viku var landsliðsmaðurin Hans Fróði Hansen so óheppin, at óstbeinið brotnaði.

Teir vóru tveir, sum fóru upp eftir høgum bólti. Hans Fróði var so óheppin at detta niður á økslina, og hann merkti beinanvegin nógva pínu. Á sjúkrahúsinum varð staðfest, at tað var óstbeinið, sum var brotið. Í fyrsta umfarið hevur læknin sagt, at Hans Fróði skal einki gera í fýra vikur, frætta vit úr Noregi.

Tað er einki at siga til, at fótbóltslagið ikki er nakað serligt á føroyska verjuspælaranum í Sogndal. Umframt at hann var noyddur at siga landsliðstúrin til Spania frá sær, so hevur brotið við sær, at Hans Fróði við ringum tannabiti fer at hyggja at, meðan liðfelagarnir halda fram við at taka fyrsta tunga takið í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið.

At ærukæri og miðvísi føroyski spælarin ikki sleppur upp í part, kann fara at hava árin á alt kappingarárið, og tað er sera spell fyri Sogndal, landsliðið og serliga Hans Fróða Hansen sjálvan, sum hevur lagt so ómetaliga nógv fyri í strembanini eftir at gerast fulltíðar yrkisspælari.

Dreymurin um at fáa møguleikan at liva av at spæla fótbólt í Bretlandi livir vónandi framvegis, men tað er sjálvsagt, at skaðasteðgurin ger, at tað verður meiri strevið, enn tað frammanundan hevur verið.

### Brotið kostaði nógv

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at óstbeinið hjá Hans Fróða Hansen brotnar. Í 1996 flutti leirvíkingurin úr barndómsfelagnum og til B68 at spæla. Ivaleyst eftir ráðum frá Jógvani Martin Olsen, sum tá var nýggjur hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, og sum frammanundan hevði verið venjari í Leirvík, gav landsliðsvenjarin Hans Fróða Hansen, sum tá ikki var serliga kendur í føroyska fótbóltsheiminum, boð um at koma við niður til Beograd, har fyrsti dysturin í HM undankappingini varð spældur 24. apríl 1996 ímóti nýggja og tódnaða Jugoslavia.

Hans Fróði sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, og hann fekk ikki landsliðsboð aftur fyrrenn í fyrraárið. Í Estlandi sat hann allar 90 minuttirnar á beinkinum og hugdi at, tá liðfelagarnir taptu 5–0. 19. august 1998 fekk hann møguleikan í Bosnia, og síðani hevur Hans Fróði verið fastur miðverji. Higartil hevur hann spælt ellivu landsdystir, og hann hevur skorað eitt mál – til 1–1 móti Skotlandi á Svangaskarði í fjør.

Orsøkin til at tað gekk so long tíð frá tí, at Hans Fróði fyrstu ferð var á beinkinum og til hann aftur fekk landsliðsboð var fyrst og fremst, at óstbeinið brotnaði stutt eftir ferðina niður til Jugoslavia. Tað gjørdi tað í dysti millum GÍ og B68. Brotið hevði við sær, at Hans Fróði ikki kom í ta venjingarstøðuna, sum skal til, um hann skal vísa síni góðu evni sum verjuspælari, og í 1997 spældi hann aftur í Leirvík.

Í 1998, tá Hans Fróði flutti til HB, hevði hann vunnið á brotinum, og tað sást aftur í avrikunum á vøllinum, sum høvdu við sær, at hann aftur fekk landsliðsboð.



*Hans Fróði Hansen hevur enn eina ferð brotið óstbeinið*

Tað er sama óstbeinið, sum brotnaði fyri knøppum fýra árum síðani, og sum nú brotnaði aftur, men tað er ikki brotið í sama staði.

JH